Landsgrannskoðanin

søkir eftir starvsfólki

Søkt verður eftir starvsfólki at byrja 1. september 2002 ella eftir avtalu.

Starvið:
Talan er um áhugavert og fjølbroytt starv, sum gevur gott innlit í føroysk samfelagsviðurskifti. Arbeiðið fevnir um grannskoðan av almennum stovnum, skipanum og virkjum, herímillum eftirlit við, at:

- roknskaparhaldið er í tráð við galdandi bókhalds- og roknskaparreglur, og at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar
- landsumsitingin hevur hildið seg innanfyri játtanir á fíggjarlógini
- inntøkur og útreiðslur innan t.d. skatta-, almanna-, vinnu-, fiskivinnu- og mentamál eru hildnar í tráð við lógir, kunngerðir og reglugerðir á økinum
- landsumsitingin hevur loyst sínar uppgávur á ein sparnan og virknan hátt samsvarandi endamálinum við játtanini

Til ber at laga arbeiðsuppgávur eftir førleika og áhuga. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Leiv Harryson á tlf. 355100. Fyrispurningar verða viðgjørdir í trúnaði.

Førleikakrøv:
Umsøkjarar hava fyrimun, um teir hava útbúgving innan grannskoðan, løgfrøði ella roknskap o.l., og hava royndir innan almenna ella privata umsiting. Dentur verður eisini lagdur á, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er arbeiðssamur, dugir væl at skriva og kann vera við í fakligu menningini av arbeiðsgongdunum á stovninum.

Útbúgvingar- og eftirútbúgvingarmøguleikar:
Arbeiðið á Landsgrannskoðanini skal vera á høgum fakligum støði, og tí leggja vit dent á at bjóða starvsfólki okkara útbúgving og eftirútbúgving. Landsgrannskoðanin er við í mennandi samstarvi ímillum norðurlendsku ríkisgrannskoðanirnar, og starvsfólkunum stendur m.a. í boði at fara á skeið og at arbeiða styttri tíðarskeið í hinum norðurlondunum.

Lønar- og setanarviðurskifti:
Lønar- og starvsviðurskifti verða ásett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn:
Skrivlig umsókn við aviriti av prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juli 2002. Postadressa: Landsgrannskoðanin, J. Paturssonargøta 9, Postrúm 376, 110 Tórshavn. (Tlf. 355100. Fax: 355101. Teldupostur: gralands@post.olivant.fo).

LANDSGRANNSKOÐANIN *er stovnur undir Løgtinginum,sum virkar sambært L1. nr. 25 frá 21. apríl 1999« um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. »Landsgrannskoðarin er skrivari hjá løgtingsgrannskoðaranum, og tí fyrireikar og avgreiðir Landgrannskoðanin mál vegna løgtingsgrannskoðararnar, sum m.a. gjøgnumganga og leggja almennarr roknskapir fyri Løgtingið at góðkenna.*

Sernámsdepilin

Mentamálaráðið

Í skúlaverkinum er eitt starv sum **teknmálsráðgevi** leyst at søkja til at taka við 1. september 2002 ella eftir nærri avtalu. Starvsstaðið er Sernámsdepilin, men umsøkjari má tola møguliga broyting seinni. Møguliga kann talan vera um 2/2 størv, ið kunnu verða skipað eftir umstøðunum í samráð við Sernámsdepilin/Mentamálaráðið.

Teknmálsráðgevin skal undir ábyrgd stjórans í Sernámsdeplinum

- saman við fakfólkum virka fyri at tryggja at førleikin til tiltøk og fakliga røkt á deyvaøkinum alsamt er nøktandi og í menning, soleiðis at sum best kann byrgjast fyri og minkast um darvandi árin av at vera deyvur ella av vánaligari hoyrn annars – eisini við øðrum loysnum enn við teknmáli
- ráðgeva skúla- og øðrum viðkomandi myndugleikum, foreldrum, pedagogum, lærarum og øðrum avvarðandi viðv. neyðugum atlitum – bæði til fakliga og persónliga menning hjá børnum og ungum.
- Í samráð við leiðsluna í Sernámsdeplinum leggja til rættis og fyriskipa teknmálsførleikagevandi og upplýsandi skeiðvirksemi til tess at náa nevndu endamálum.

Førleikakrøv

- Lærari við serútbúgving og royndum á deyvaøkinum og sum er kønur í teknmáli.

Arbeiðið krevur alsamt meira servitan. Tí er tað ein avgerandi fyritreyt fyri trivnaðin í starvinum, at umsøkjarar eru serstakt áhugaðir í júst hesum øki.

Umsóknir frá lærarum, ið eru undir eftirútbúgving á deyvaøkinum, eru eisini vælkomnar.

Lønin verður ásett eftir sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 30.1 til 32.2.

Umsóknir við viðmælum skulu vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 19. juli 2002.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til stjóran í Sernámsdeplinum ella til deildarstjóran í Fólkaskúladeildini í Mentamálaráðnum.



Lesið Sosialin

Víkingur 800 árg. 2000

Motorur Volvo Penta 230 HP siglt 1800 tímar
5 stk. snellur, línuspæl og línurennu
kr. 890.000 u/ mvg tá hann er í Føroyum
til sølu vegna keyp av nýggjum Gáski báti.

Gáski 800 árg. 7/1991

Motorur skiftur 11/1997 Cummins 350 HP
4 stk. snellur línuspæl og línurennu
kr. 685.000 u/ mvg tá hann er í Føroyum.

Gáski-bátar
Jens Mortan Rasmussen
tlf. 227830/442198

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Pedagogar og hjálparfólk til býlingshúsið undir Brúnni

Tórshavnar kommuna søkir eftir 2 pedagogum og 2 hjálparfólkum til Býlingshúsið undir Brúnni.

Størvini
- eitt starv 40 tímar um vikuna sum pedagogur
- eitt starv 30 tímar um vikuna sum pedagogur
- eitt starv 35 tímar um vikuna sum hjálparfólk
- eitt starv 30 tímar um vikuna sum hjálparfólk

Stovnslýsing
Í Býlingshúsinum undir Brúnni ganga 47 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við ávikavist 20 og 17 børnum og einari vøggustovu við 10 børnum.

Vit bjóða
- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum,
- at tú fært møguleika fyri at seta tín dám á stovnin,
- møguleika fyri ráðgeving

Vit ynskja
- at tú hevur hug og áræði til at skapa ein fjølbroyttan og mennandi gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum,
- at tú arbeiðir sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir.

Setanarviðurskifti
Størvini verða sett tann 5. august 2002. Løn sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Føroya pedagogfelag.

Meira fæst at vita
um størvini við at venda sær til Guðruna Wang, settur leiðari , tlf. 319180 ella Katrina Petersen, samskipara tlf. 315160.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum undir Brúnni, Smærugøta 9b, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 12. juli 2002.

SNARSKIVAN

Frá Fuglafjarðar býráð

Feløg og einstaklingar, sum hava ætlanir um at nýta fimleikarhøll skúlans vetrarhálvuna 2002–2003, verða biðin um at senda mentamálanevndini skrivliga umsókn í seinasta lagi **hósdagin 15. august 2002 kl. 15.00.**

Fuglafjørður, tann 24. juni 2002
Fuglafjarðar býráð

Til sølu

Ein gráur Renault Laguna 3.0 Dynamic við chip Tronic og aðrari eyka útgerð (árg 8/2001). Verður seldur við stórum avsláttri. Annar bilur kann møguliga ganga inn í keypið.

Tlf 217406 - 213388

Mentamálaráðið
Mentamáladeildin

Avloysari fyri fulltrúa

Vegna barnsburðarfarloyvi er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum fulltrúi í Mentamáladeildini leyst at søkja. Setanartíðin er frá 1. august 2002 til 1. apríl 2003.

Mentamálaráðið er skipað í 3 deildir: Fólkaskúladeild, Vinnu- og Miðnámsskúladeild og Mentamáladeild. Herumframt er ein stápsdeild við løg- og búskaparfrøðingum. Í Mentamáladeildini starvast, umframt deildarstjóran, tveir fulltrúar, ein ráðgevi og ein skrivari.

Starvið
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:

- At umsita, tryggja menning og samstarv og røkja samskiftið við teir skúlar, stovnar og øki, ið eru undir Mentamáladeildini, herundir serliga Sjúkrasystraskúlan og Almanna- og Heilsuskúlan, og at taka sær av málsviðgerð í hesum sambandi
- At røkja samskiftið og málsviðgerð í sambandi við fólkakirkjuøkið
- At umsita ymiskar stuðulsjáttanir
- At ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- At taka sær av málsviðgerð sum heild
- At átaka sær ávísar avmarkaðar og/ella tvørgangandi uppgávur eftir deildarstjórans avgerð
- At taka lut í arbeiðsbólkum
- At røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdir eru í samsvar við nútímans krøv.

Førleikakrøv
Umsøkjari skal

- hava útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- kunna arbeiða sjálvstøðugt umframt samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- vera fyrikomandi og hevur góð samstarvsevnir
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

Vit bjóða
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Setanar- og lønartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsókn
Umsókn við prógvum, C.V. o.ø skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 1. juli 2002, kl. 12.00.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, t-post: joannes@mms.fo, tlf. 355050 og 215052, Kristionnu S. Jacobsen, fulltrúa, t-post: kristianna@mms.fo, tlf. 355050 og 215037, ella Petur Petersen, aðalstjóra, t-post: petur@mms.fo, tlf. 355050.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Mentamálaráðið er skipað í tríggjar deildir - Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild.
Mentamáladeildin hevur fyrisitingina av hægri útbúgvingum, mentamálum, gransking, søvnum, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Harafturat fyrisitur deildin ávísar uppgávur viðvíkjandi kirkjuni.

Dagrøktari

søkist til dagrøktina í Oyndarfirði, at byrja 15. august 2002.

Dagrøktarheimið skal vera innrættað barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spæliøki uttanfyri.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja tlf. 44 47 83.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 20. juli 2002.

Dagrøktarskipanin í Oyndarfirði
v/ Eriku L. Petersen
690 Oyndarfjørður

Pedagogur til Sernámsdepilin

Søkt verður eftir pedagogi til Sernámsdepilin hálva tíð skúlaárið 2002/2003. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. august 2002 til 31. juli 2003. Tann, sum settur verður, kemur at arbeiða við eygleiðing og samskifti í smábarnadeildini. Pedagogur við talilæraraútbúgving hevur fyrimun. Lønin er samb. sáttm. millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir til starvið skulu vera Sernámsdeplinum, á Frælsinum 32, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 11. juni 2002.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Magnus Hansen, tlf. 22 37 12.

Sernámsdepilin

Sosialurin -tað loysir seg